# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lítið nýtt um Føroyar og PET

Lítið nýtt er um Føroyar í PET frágreiðingini. Her fæst at kalla einki at vita, sum vit ikki vistu framman-undan av frágreiðingunum frá kanningunum um Føroyar undir Kalda krígnum. Hóast hesa atfinning er frágreiðingin áhugaverd fyri okkum føroying-ar, treyðugt so. Tað er sjálvsagt áhugavert at lesa, at danska stjórnin við virkseminum hjá PET breyt sínar egnu reglur um eitt nú skráseting av politisk-um virksemi hjá lógligum politiskum flokkum og felagsskapum í ríkinum. Grefligasta dømið man vera eitt nógv umrøtt loyninotat frá 1968 vent ímóti vinstrahallum politiskum virksemi. PET skuldi skráseta einstakar danskar ríkisborgarar fyri teirra politisku áskoðan og virksemi. Um sama mundið, sum stjórnin góðkendi hesa ætlan, boðaði forsætisráðharrin frá, at eingin í danska ríkinum varð ella fór at verða skrásettur fyri politiska áskoðan ella virksemi.

Nú skal hetta sjálvsagt síggjast við Kalda krígnum í baksýni. Kalda kríggið elvdi til ein ágangandi hugburð ímóti øllum politiskum virksemi vinstru-megin sosialdemokratisku flokkarnar í Europa. Undir slíkum umstøðum hildu demokratiskt valdar stjórnir tað vera rímiligt at benda lógina fyri at tryggja seg móti landsskaðiligum virksemi frá Sovjetvinarligum borgarum. Sovjetsinnaður var at kalla hvør tann hildin at vera, sum var limur í vinstrahallum flokki ella felagsskapi ella, sum tók lut í friðararbeiði ella, sum var limur í friðarrørslum. Tað er í hesum høpi áhugavert, at PET var sera virkið í sambandi við stóru altjóða friðarráðstevnuna í Keypmannahavn í 1988, har eisini umboð úr Føroyum tóku lut. PET frágreiðingin avdúkar, at partar av donsku pressuni samstarvaðu við PET um at sverta ráðstevnu so væl sum einstakar luttakarar. Fyri okkum, sum royna at halda fast um hugmyndina av pressuni sum "óhefta fjóðra statsvaldið" er hetta sjálvsagt hugstoytandi lesnaður.

Sum nevnt er ikki nógv nýtt um Føroyar. Vit fáa enn einaferð váttað, at russaraóttin var stórur og at PET eins og aðrir danskir myndugleikar óttaðust búskaparliga samstarv Føroya við Sovjet og onnur lond handan jarntjaldið. Danskir myndug-leikar høvdu eftirlit við virkseminum hjá stóra veiðiflotanum hjá Sovjet og øðrum eysturblokks-londum, men sum væntað eru eingi dømi um føroyingar, sum runnu ørindi fyri Sovjet.

Partar av donsku pressuni hava longu gjørt vart við, at PET nevndin ikki hevur givið okkum allan sannleikan. Orsøkirnar eru nógvar, eitt nút, at partar av skjalasøvnum PETs eru burturbeindir og at PET nevndin ikki hevur troytt allar tøkar heimildir um evnið. Sostatt kenna vit enn ikki allan sannleikan um danska ríkið undir Kalda krígnum, og seinasta orðið er tí ikki sagt í hesum máli. Alt bendir á, at øll skrásett fáa rætt til skjalainnlit í egnar journalir. Um stutta tíð kann tí ein og hvør, sum heldur seg hava verið í kikaranum hjá PET, fáa hetta váttað ella avsannað og krevja at verða strikaður av skránni yvir fólk, ið hava rikið lands- ella ríkisskaðiligt virksemi.

**Sosialurin**

## Er Liberia (og Afrika sum heild) ein møguleiki?

**BJARTI THOMSEN**



Føroyingar hava ov nógv fiskiskip á heimaleiðum, serliga línuskip, sum kundu verið til nyttu aðrastaðir, t.d. í Afrika.

Jørgen Niclasen, uttan-ríkisráðharri, var á tænastu-ferð í Liberia fyrr í ár. Hann hitti nógv gott fólk, m.a. Chris Tore, landbún-aðarráðharra, ið eisini umsitur fiskivinnumál, Miata Beysolow, vinnu-málaráðharra, og Walther T. Gwenigale, almanna-og heilsumálaráðharra. Nið-urstøðan er, at Liberia ynskir vinnuligt samstarv við Føroyar, og verður serliga víst til ríkidømi í havinum. Liberia hevur 570 km langa strond fram við havinum og teirra havøki og niðurundir-komna fiskivinna liggja sostatt opin fyri føroying-um at menna.

Liberia hevur verið ígjøgnum eitt 13 ára langt altoyðileggjandi borgara-kríggj. Hetta endaði í 2003, tá ST kom við stór-um friðarherliði, og nú verður royndt at byggja uppaftur. Fiskivinnan í Liberia hevur verið for-sømd so dyggiliga, bæði av stjórnini og hjálparfelags-skapum undir og aftaná kríggið. Við 3.500 kano-um, harav bara 8% hava motor, royna 13.000 fiski-menn í 169 bygdum fram við strondini at fáa sum mest burturúr og avreiða til 18.000 fiskaframleiðarar, sum fyri tað mesta roykja fiskin á báli. Størstu trupul-leikarnir í fiskivinnuni í Liberia eru peningamangul til íløgur og ránsveiða av fremmandum trolarum.

Nøkurlunda sama skil, tó ikki so ringt, er í nógvum øðrum Afrikonskum lond-um. ES hevur í nógv ár haft fiskivinnuavtalur við londini runt um á Afrika strondini. Á ráðstevnu í Føroyum fyri kortum, segði Poul Degnbol, ein av høvuðsfyrireikarunum (strategunum) av nýggja ES fiskarípolitikkinum, at ES fór ikki framhaldandi at gera hesar sáttmálar. Tískil er onki forgjørt í, um før-oyingar nú liggja framvið og brúka hendan møgu-leika at skapa víðari ræsur fyri føroyska fiskiflotan, samstundis sum hetta kann verða við til at fáa fiski-vinnuna í fjarskotnum londum á føtur.

So, Jørgin góðin, far aftur til Liberia, og tak hálvan línuflotan og eitt vaktarskip við.

## Útbúgving til øll

**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN**



Vit síggja tær allastaðni. Glað-ar, við húgvu og einum stór-um brosi. Pisurnar. Hjartaliga tillukku allar og blíðan byr!

Øll áttu at fingið møgu-leikan. Harmiligt, tá fólk ikki sleppa á miðnámsskúla ella hava møguleika at fara undir útbúgving í Føroyum – vegna ov fá útbúgvingar-pláss. Fleiri dømi hava tíverri verið um júst tað, seinastu tíðina.

**Tey við skerdum førleika**
Ein bólkur er sum bert hevur EIN møguleika fyri 9. floks prógvi ella FHS – nevniliga á ALV skúlanum við Áir. Skúlin er fyri vaksin við skerdum vinnuførleika vegna eitt nú heilsubrek, sosialum ávum ella vegna vanlukku. ALV skúlin er einasta tilboð til teirra, sum er – og kortini er bert rúm fyri 2. hvørjum umsøkjara. Tey, sum ikki sleppa inn kunnu ikki bara siga: "gott er, so arbeiði eg eitt ár!" ella "kanska eg so fari á handilsskúlan heldur!" tí ALV skúlin er einasti møgu-leiki hjá teimum í Føroyum. Kortini raðfesta og menna vit ikki hetta tilboðið, hóast tað nú eru mong ár síðani eldsálin Karolina Petersen, sála, fekk hetta í lag.

**HF prógv eftir 3 ella 4 ár**
Herfyri fingu tónleika -og ítróttarfólk møguleika fyri at taka HF upp á 3 ella 4 ár. Alt gott um tað og tað fegn-ast vit um. Átti hesin møgu-leikin ikki eisini at verið givin teimum, sum vegna tvørrandi førleika kundu havt gagn av skipanini? Talan kundi verið um eitt nú stakar uppihaldarar, fólk sum eru sjúk, bera brek ella hava sosialar trupulleikar.

**Gomul og veik: Út**
Las herfyri um kanning úr grannalandi. Fólk vóru spurd, hvør fyrst skuldi koyrast, tá vinnuvirki í hesum tíðum høvdu fyri neyðini at minka um starvs-fólkatalið. Ein triðingur svaraði: "Tey gomlu og tey veiku." Hetta, hóast stórar kampanjur fyri at skapa eina hugburðsbroyting og rúmd fyri sonenvnda 'gráa gulli-num' og rúmliga arbeiðs-marknaðinum.

Vóni ikki, at svarið hevði verið tað sama her. Men, hetta kann vera ein ábending um, at tað er meira umráð-andi enn áður, at øll fáa møguleikan fyri hóskiligum skúlatilboði.

**Vaksa um talið av vinnuførum**
Eg haldi tað vera eina sjálv-sagda og átroðkandi uppgávu hjá okkum júst nú – saman við einum lógarkarmi sum skapar ein arbeiðsmakna fyri øll – at útbúgving verður ein møguleiki hjá nógv fleiri. Vón-andi verður júst hetta ein partur av vakstarpakkanum.

### Orðabókin 75 ár 20. juni 2009

Málmaður fyllir
sjeytifimm ára aldur.
Til lukku mæti!

Orðfylta tægu,
roka, flýddi tú okkum.
Vit brostakka tær!

Orðfjálgur maður
sær miklan varða setti.
Ei gloymist seggur.

Ynski tær eitt blítt,
orðaríkt, vesturskin.

Bn

Eg havi sitið við
Gamaliels føtur

Lesið
Sosialin
-tað loysir seg

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.